## DAGSINS MEINING

# Gott tiltak

Í dag setur løgmaður fiskivinnustevnuna ”North Atlantic Fish Fair” í Runavík. Hetta er aðru ferð, at tað verður skipað fyri hesum stóra og slóðbrótandi tiltakinum í Eysturoynni. Á stevnuni luttaka nógvar føroyskar og útlendskar fyritøkur og framleiðarar og fara uttan iva fleiri túsund føroyingar at leggja sær leiðina framvið høllini í Runavík stevnudagarnar.

NÚ er tað sum so ikki nakað nýtt at skipa fyri framsýningum av ymsum slag í Føroyum. Men tað nýggja við hesum tiltakinum er støðið og støddin. At fyrireikararnir hava tikið stig til eitt afturvendandi tiltak, sum fevnir um okkara høvuðsvinnur, fiskivinnu og aling og har útlendski parturin er týðandi er at fegnast um. Hetta at føroyskar og útlendskar fyritøkur kunnu sýna fram lið um lið hevur eisini nógv at siga fyri føroysku framleiðararnar og tær fyritøkur, sum marknaðarføra ymsar vørur við tilknýti til okkara høvuðsvinnur. Hetta gevur íblástur – hetta at kappingarneytar eisini kunnu hittast í einum góðum umhvørvi umframt at føroyski brúkarin hevur atgongd til vørur og tænastur, sum hann annars ikki er vanur við at síggja dagliga.

Fyrireikararnir siga endamálið við framsýningini vera at skapa møguleikar hjá føroyskum fyritøkum við tilknýti til fiski- og alivinnuna at sýna fram sínar tænastur fyri altjóða marknaðinum – á heimavølli. Og á henda hátt í størri mun kunna um Føroyar og tær fjøltáttaðu vit kunnu veita á hesum øki.

Áhugavert er tað eisini, at okkara nýggja flaggskip Norrøna verður partur av tiltakinum. Hetta kann vónandi eisini vera við til at skapa áhuga millum føroyingar og útlendingar at troyta teir møguleikar, sum hetta stóra ferðamannaskipið gevur. Her verður bæði hugsað um ferðafólk og farm.

Sosialurin verður eisini við á fiskivinnustevnuni við egnum bási.Vit halda tað hevur týdning fyri allar partar, at fjølmiðlar eru á staðnum alla tíðina og ikki bara koma fyri síðani at rýma aftur. Vit fara at gera okkara til at dekka fiskivinnustevnuna í blaðnum og á netinum alla vikuna og vilja vit við hesum ynskja øllum eina góða fiskivinnustevnu.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Játtanir í óðum verkum

**Jógvan Arge**
*Løgtingsmaður fyri tjóðveldisflokkin*



Heðin Mortensen er vorðin so skrivandi, síðani hann kom aftur úr páskafríi. Sum ein av ímyndunum av kommunala hurlivasanum á Vaglinum er hann av øllum farin at slongja um seg við ákærum.

Samstundis verður roynt at draga býráðspolitikk í Havn upp í løgtingspolitikk við teimum ivasomu fylgjum, sum tað kann fáa fyri borgararnar.

Hetta hendir m.a. í sambandi við eitt uppskot frá sambandsflokkinum um, at landið skal veðhalda fyri 87 milliónum krónum til at byggja Tekniskan Skúla og partvíst Handilsskúla, ið fara at kosta landskassanum omanfyri 100 milliónir krónur.

Aftrat veðhaldinum skal landskassin einsamallur sambært uppskotinum gjalda allar hesar meir enn 100 milliónirnar sum studning til raksturin hjá somu skúlum tey komandi 25 árini.

Hækkingin í rakstrarstudninginum skal brúkast til at gjalda avdráttir og rentur aftur við, sum landskassin fyrst hevur veðhildið fyri.

Tað hevur fyrr verið roynt í ólukkumát at rista breiðar álir av landskassanum.

Vit í tjóðveldisflokkinum ásanna, at Tekniski Skúli, Handilsskúlin og fleiri miðnámsskúlar í Havn og aðrastaðni í landinum hava brúk fyri betri hølis- og arbeiðsumstøðum.

Tá vit koma til tann fíggjarliga partin, er okkara grundsjónarmið, at framtøkini skula sampakka við tann almenna íløgukarmin hjá landinum.

Vit hava eisini ta støðu og ætlan, at játtanin á fíggjarlógini til íløgur í slíkar skúlar skal økjast munandi komandi árini, so hvørt sum longu samtyktar íløgur í onnur málsøki hæsa av.

Verður mannagongdin, at stórur partur av íløgunum í eitt nú skúlar fer sum veðhald og studningur langt fram í tíðina uttanfyri íløgukarmin, sum ætlanin er við sambandsuppskotinum hjá teimum báðum Jóhan Dahl og Heðin Mortensen, er skjótt at koyra landið aftur á ørmundarhús.

Har ein skriðan er lopin, er onnur sum kunnugt væntandi, og fyri so høgan prís plagdi ikki at vera skilagott at handla í óðum verkum.

# Vandalisma?

**“í samband við gerð av ríðibreyt niðri við vatn”**

**Holgar Jacobsen**

Viðmerking til grein í Dimmu 16/4-03. Eg havi ofta lisi greinar í Sonni Jacobsen hevur skriva, við stórum áhuga, hann er jú ein skrivandi maður, soleiðis var eisini ein mikudag fyri stuttum, tó so,tá gjørdist eg sera skelkaður?. Tí hesar reglur.

Eg veit satt at siga ikki hvat Sonni vil við hesari skriving, í hann hevur um virksemi hjá Vága ríðingarfelag, ella sum hann sjálvur nevnir “rossamennirnir”. Tí sum greinin er skriva, vísir hann ein mótvilja móti Vága ríðingarfelag gjøgnum alla greinina, og ein so nógv skrivandi maður sum Sonni átti ikki at lati hettar komi fram við síni skriving, so klárt.

Eg trúgvi satt at siga ikki, at tað er flúgvarabedingin í Sonni er so keddur yvir, um so var, hevði hann fyri langari tíð síðan havt gjørt vart við seg sum formaður í Sørvágs bygdasavni, tí flúgvarabedingin hevur ikki sæð so gott út, sum hann nevnur í brævinum, slett ikki, tí síðan krígslok hava teymarnir í ganga út frá henni “tað er har í banin liggur” verði karmur um órudd av trolum, lemmun, avfresaðum asfalit v.m. Teir heyggjar í nú eru slættaðir, eru ikki nattúrheyggjar, men gjørdir av maskinum undir seinna heinsbardaga. Annars er ikki nógv av flúgvarabedingini lagt undir, bert tveir teymar og ein partur av bakkanum, so tey søguligu virðini hava neyvan fingi skaða av tí orsøk.

Tá tú tosar um banan longri uppi, skilji eg teg slettis ikki, hann liggur oman á gamla bygdavegnum til Sørvágs í uttan iva man verða eitt fornminni, og at gerða ein ringbana har, hevði skemma náttúruna óneyðuga nógv ,har er jú stórur jarðarmunur,so har hevði tú sum formaður í Sørvágs bygdasavni verði noyddur at mótmælt, og eg hevði tá verði púra samdur við tær, eisini hevði verði trubult at fingi neyðugu loyvini frá avvarandi myndugleikum, um leiðu v.m.

Eg skilji slettis ikki at tú sum formaður í Sørvágs bygdasavn ferð í bløðini við hesum málið, áðrenn tú hevur tosa við avvarandi mynduleikar fyrst, men sjálvandi eru ymiskir mátar at frambera síni sjónarmið.

Annars kann eg siga, at eg ikki eri í nevndini hjá Vága ríðingarfelag, so hendan viðmerkingin er frá mær sjálvum, men sum limur í felagnum eri eg glaður fyri at banin er komin, og vón mín skal verða at nógv fólk fáða gleði av hesi breyt í frammtíðini, tað verður seg ríðingarfólk og onnur í vilja njóta náttúruna í hesum avbera vakra umhvørvi, tó spell er at summi fólk altíð mótmæla, tá okkurt verður gjørt, um tað er persónligum orsøkum, peningaligum ella bara fyri at verða hoyrd,skal verða ósagt.

Hettar er ein endalig viðmerking til greinina hjá tær Sonni, eg ætli mær ikki út í nakað blaðkjak, tí tað tími eg slett ikki.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Hava ávísir politikarar einki lært av búskaparkreppuni ?

**Kristina Háfoss**
*Fíggjarpolitiska framsøgufólk Tjóðveldisfloksins*



”Vit skulu læra av okkara feilum”. Soleiðis verður ofta tikið til - og kunnu øll taka undir við hesum. Men tíverri er nógv, ið bendir á, at nógv av teimum umboðum, ið sita á Løgtingi, ikki hava lært av teimum feilum, ið vórðu gjørdir fyri bert fáum árum síðan. Tí í hesu vikuni skal Føroya Løgting taka støðu til eitt uppskot frá Sambandsflokkinum, ið snýr seg um, at landið nú aftur skal til at taka lán, veita veðhald og víkja frá prinsippinum um, at rinda ’kontant’ fyri almennar íløgur og prinsippinum um at útreiðslur og virksemi skulu fylgjast at í einum ári. Harvið verður eitt av høvuðs stýringsamboðunum í føroyska búskaparpolitikkinum blakað fyri borð og farið verður aftur til 80’ara politikk.

### Skúlabygging skal fíggjast við skili

Samgonguskjalið sigur m.a., at í hesum valskeiðnum skal farast undir ymsa skúlabygging - eitt nú bygging av Tekniska skúla og Studentaskúla í Tórshavn. Og so verður. Men hesar byggingar skulu eins og allar aðrar fíggjast við skili og í trá við ta játtanarskipan, ið vit hava í dag. Eina játtanarskipan, ið tryggjar at landsins útreiðslur mynda tað virksemið, sum er í tí ári tær verða játtaðar av Løgtinginum, og at landið harvið hevur møguleika at stýra almenna virkseminum og føra ein búskaparpolitikk..

Men hesum taka allir løgtingslimir eftir øllum at døma ikki undir við. Tí í mars mánaða legði Sambandflokkurin fram uppskot um at veita landskassaveiting til fígging av yrkisútbúgvingarskúlum í Tórshavn. Ætlanin er, at landskassin skal veita veðhald fyri 87 mió. kr., ið skulu nýtast at fíggja nýggjan Tekniska skúla í Tórshavn.

### Ikki lántøku og veðhald – tí…

Uppskotið hjá Sambandsflokkinum, ið merkir, at landið aftur fer at fíggja íløgur við lántøku og harvið afturrindan eftir fleiri árum – heldur enn at rinda ’kontant’ - má ikki gerast veruleiki av fleiri orsøkum:

- Sambandið millum landsins útreiðslur og virksemið hvørvur
- Harvið hvørvur møguleikin fyri stýring av almennum íløguvirksemi, ið er eitt av høvuðs stýringsamboðunum í almenna búskaparpolitikkinum.
- Landskassin verður bundin til fastar útreiðslur til rentur og avdráttir í eitt langt áramál. Harvið verður ikki møguligt at laga íløguútreiðslurnar ár undan ári í mun til búskaparstøðuna og landsins inntøkur.
- Landskassin fær stórar og óneyðugar eykaútreiðslur til rentur. Hetta eru útreiðslur, ið annars kunnu verða nýttar til skilagóðar íløgur. Tí tað er ikki peningur í manglar. Landið eigur í dag um 2,5 mia. kr. í tøkum peningi og kann rinda allar íløgur kontant. Men roynt verður at býta og avmarka almenna íløguvirksemið soleiðis, at almenna virksemið ikki avlagar virksemið og kostnaðarstøðið í landinum og soleiðis at føroyski búskapurin ikki gerst ov ’upphitaður’.
- Somuleiðis vil eitt undantak tá umræður lántøku fyri ein sjálvsognarstovn – í hesum førum Tekniska skúla - merkja, at eitt ovurstórt trýst kemur á alla ta politisku skipanina um at seta gongd á hópin av byggivirksemi. Hetta tí tað við lántøku kann kennast ’bíligt’ pr. ár – men kemur tó at binda fíggjarorku í eitt langt áramál og kosta landinum eina munandi størri upphædd.
- Øll eiga at verða líka fyri lógini. Sleppur ein sjálvsognarstovnur sum t.d. Tekniski skúli at fíggja íløgur við lántøku – ja, so eiga aðrir somuleiðis at fáa henda møguleikan. Og hetta kemur at merkja, at alt sum eitur stýring av føroyskum virksemi og búskapi hvørvur.

Er hetta nakað, ið føroyskir politikarar ynskja ? Undir 1. viðgerð av málinum í Løgtinginum tók ein meiriluti - Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og partar av Fólkaflokkinum - undir við uppskotinum, men vónandi verður annað skil, tá komið verður til 2. og 3. viðgerð av málinum. Annars sær svart út, tá umræður at ’læra av feilum’.

### Lántøka er ikki alternativ fígging

Undir 1. viðgerð varð av uppskotstillaranum m.a. tosað um, at neyðugt verður við alternativari fígging. Men tað skuldi verið øllum kunnugt, at lántøka í øllum førum ikki er nakað nýtt og alternativt.

Somuleiðis varð víst á, at undirsjóvartunlarnir, hava fingið møguleika at fíggja virksemið yvir eitt langt áramál. Kjakað kann verða um, hvørt tað var rætt at nýta henda fíggingarhátt, men undir øllum umstøðum kunnu hesar íløgur ikki samanlíknast við eitt nú skúlabygging. Undirsjóvartunlarnir vórðu stovnaðir sum partafeløg og verða partvíst inntøkufíggjaðir umvegis bummgjøld. So er og verður ikki við skúlum, sjúkrahúsum, ellis- og røktarheimum o.l.

### Raðfesta bygging innan skúla-, almanna- og heilsuverk

Seinastu árini er nógv tann størsti parturin av íløgukarminum nýttur til tunnlar, vegir, skip og samferðsluøkið sum heild. Nú er tað almanna-, heilsu- og útbúgvingarøkið, ið eigur tørn. Nevnast kann, at komandi árini verða íløgur gjørdar í ellis- og røktarheim fyri um 19 mió. kr. (+19 mió. kr. frá kommununum) um árið, meðan 35-45 mió. kr. um árið fara til sjúkrahúsverkið og ein enn størri upphædd til skúlabygging.

Tá umræður skúlabygging standa Miðnámsskúlin í Vági og Sjódepilin í Vestmanna á skránni í ár, og farið verður somuleiðis undir at fyrireika bygging av Miðnámsdepli (Tekniskur skúli, Handilsskúli og Studentaskúli) í Tórshavn, Listaskúla á Sandoynni og útbygging av Tekniska skúla í Klaksvík. Alt í alt verða hesar byggingar mettar at kosta umleið 380 mió. kr. yvir eitt áramál. Hetta svarar til kostnaðin av einum undirsjóvartunli ella einum Suðuroyarskipi við samferðsluhavn.

### Ongin forðing fyri skilagóðari fígging

Í ár er samlaði íløgukarmurin hjá landinum 283 mió. kr. – harav 125 mió. kr. í ár fara til íløgur í Suðuroyarskipið og samferðsluhavnina í Trongisvági. Nú Suðuroyarskipið verður goldið komandi ár kann hesin partur av íløgukarminum ella góðar l00 mió. kr. verða settar av til skúlabygging fylgjandi 4 árini. Um so verður gjørt, verður komið á mál við omanfyrinevndu skúlabygginum eftir fáum árum, og tá verður talan um fígging innanfyri landsins íløgukarm og uttan at órógva búskaparstýringina. Tí er ongin fíggjarlig forðing fyri at fara undir skúlabygging, ið verður fíggjað við skili.

### Búskaparstýring – fortíð ella framtíð ?

Tekur meirilutin av Føroya Løgtingi undir við uppskoti Sambandsfloksins, ið merkir eitt farvæl til eitt av høvuðs stýringsamboðunum í føroyskum búskaparpolitikki – ja, so er als ikki talan um nakra tænastu – men eina bjarnatænastu fyri føroyska samfelagið.

Hetta er bert eitt av dømunum um, at nógv bendir á, at hugsanin frá 1980’unum er við at sníkja seg innaftur um tinggátt. Tað tykist sum onki er óført og verða atlit í alt ov lítlan mun tikin til, at búskaparvøksturin av álvara minkar longu í ár. Tos um meira almennan studning til vinnulívið, umframt lántøku og veðhald til íløgur eru bert nøkur dømi.

Greitt er tó, at so leingi Tjóðveldisflokkurin situr við landsins leiðslu verður hetta ikki veruleiki. Tí vit hava lært av búskaparkreppuni - ið rakti alt samfelagið so meint fyri bert fáum árum síðan - og fara at virka fyri, at tryggja vælferðarsamfelagið eitt nú umvegis skilagóðar íløgur á almanna-, heilsu- og útbúgvingarøkinum og umvegis trygga og málrættaða búskaparstýring.

# Grov villeiðing um skúlabygging frá andstøðuflokkunum

**Høgni Hoydal,**
*landsstýrismaður í mentamálum*

Í fjølmiðlunum seinastu dagarnar hava umboð fyri andstøðuna ført fram, at landsstýrið forðar fyri bygging av tekniskum skúla í Tórshavn, og at landsstýrismaðurin í mentamálum arbeiðir við “skúlapakkum”, sum vit kendu tað í 80’unum. Ónevndir samgongulimir eru endurgivnir fyri at siga, at íløgurnar í skúlar, sum landsstýrismðaurin hevur lagt fram, kosta omanfyri 700 milliónir krónur.

Hetta er alt tikið úr leysari luft og er grov villleiðing. Slíkir ósannir upplýsingar kunnu bert hava til endamáls at skapa politiska spjaðing, at seta skúlar upp móti hvørjum øðrum og at tæna seráhugamálum og lokalpolitiskum klandri.

### Veruleikin er hesin:

Samgongan hevur seinastu 5 árini arbeitt eftir eini langtíðarløguætlan. Tað er alneyðugt, um virksemið ikki skal ovurhitast í summum pørtum av landinum og um føroyski búskapurin ikki aftur skal rennast um koll.

Eftir íløguætlanini hava íløgur í samferðslukervið, nýtt landssjúkrahús og nú eisini íløgur innan eldrabústaðir og bústaðir til fólk við serligum tørvi, staðið fremst.

Avtalað er, at komandi árini skal skúlabygging raðfestast fremst á íløguætlan landsins, saman við almanna- og heilsuøkinum.

Tað er í tøkum tíma, tí íløgur í miðnámsskúlar og hægri útbúgving eru ikki gjørdar seinastu 20-25 árini í Føroyum, og viðurskiftini eru út av lagi vánalig hjá flestu miðnámsskúlum.

Í tí sambandi havi eg lagt eina ætlan fyri samgonguflokkarnar, sum skal tryggja, at allir teir miðnámsskúlar, ið hava so bráðneyðugan tørv á nýbygging ella útbygging verða viðgjørdir eins, og at gongd kann setast á ætlaðu íløgurnar.

### Talan er um:

- Miðnámsskúlan í Suðuroy
- Fiskivinnuskúlan í Vestmanna
- Tekniska Skúla, Studentaskúla og Handilsskúlan í Tórshavn
- Ein minni útbygging á Tekniska Skúla í Klaksvík
- Og listaskúla í Sandoynni

Hetta eru 5 verkætlanir, sum eru væl kendar og hava havt upphæddir á fíggjarlógini til fyrireiking. Bert í einum føri er talan um ein nýggjan skúla, nevniliga listaskúlan í Sandoynni. Sostatt er ikki talan um nakran skúlapakka, men um at fremja tað, sum er avtalað á langtíðaríløgu landsins.

Eftir uppskoti mínum verður farið undir tvær íløgur í ár og hinar tríggjar næsta ár. Øll tey, sum hava bíðað so leingi, kunnu altso síggja veruligan glotta fyri stavn.

Íløgurnar eru ymsar í vavi og tær størru strekkja seg sjálvsagt yvir fleiri ár.

Tað snýr seg um eina upphædd á íløguætlan landsins til skúlar uppá í miðal 38 mió. kr. árliga komandi tíggju ára skeiðið. Tað er umleið ein fjórðingur av íløgukarmi landsins.

Tey komandi 10 árini er upphæddin til miðnámsskúlar tilsamans góðar 380 mió. kr. sambært uppskotinum.

Hetta svarar á leið til ein undirsjóartunnil um eitt 10 ára skeið, og er sostatt als ikki nøkur stór upphædd í landsins løguætlan í mun til tað, vit seinastu 5 árini hava brúkt til tunlar, vegir, havnir og skip.

Málið er, at vit á landsins fíggjarætlan megna at seta skúlabygging fremst saman við íløgum innan almanna- og heilsuverkið, nú íløgur í samferðslu hava tikið bróðurpartin av játtanini seinastu 5 árini.

Viðvíkjandi byggingini í Tórshavn, snýr uppskotið seg um eina loysn, sum setur bæði Tekniska Skúla, Studentaskúla og Handilsskúlan javnt, og ikki upp móti hvørjum øðrum. Og í løtuni verður fundast við skúlaleiðslur og stýrini fyri skúlarnar til tess at prosjektera og fremja byggingina soleiðis, at allir skúlarnir kunnu liva við tí.

### Uppskotið hjá sambandsflokkinum

Uppskotið hjá sambandsflokkinum - sum eisini javnaðarflokkurin sigur seg taka undir við – snýr seg bert um at gera eina serloysn fyri Tekniska skúla og Handilsskúla í Havn. Eftir uppskotinum skal landskassin veðhalda fyri lánum uppá 87 mió. kr., sum skúlarnir skulu taka, men landskassin skal sjálvur gjalda lánið aftur við rentum.

Bara renturnar av uppskotinum hjá sambandsflokkinum er nóg mikið til at fíggja tildømis fiskivinnuskúlan í Vestmanna. Sostatt skal skattgjaldarin rinda líka nógv í rentum til ein fíggingarsto, sum vit annars kundu bygt skúlar fyri.

Fáa summir skúlar sersømdir við, at landskassin skal fíggja teir uttanum íløgujáttan landsins við rentum, so elvir hetta til dýrari loysnir, vantandi búskaparstýring, ójavna viðferð og klandur og stríð millum skúlar og økir í landinum.

Tí verður staðiliga heitt á andstøðuflokkarnar og tær ónevndu røddirnar í samgonguni um at gevast við klandrinum og spjaðingini, og heldur taka undir við at raðfesta skúlabygging á fíggjarlógini, soleiðis sum skotið er upp, og soleiðis sum mentanarnevnd Løgtingsins varð kunnað um á fundi 24. apríl. Tað gagnar ikki bert teimum fáu útvaldu, men øllum skúlunum í landinum.